

www.oljan.fo

**Jan Müller** 30 - 09 - 2013

# Faroe Petroleum missir framleiðslu í eina tíð

Um somu tíð sum Faroe Petroleum nú um dagarnar boðar frá, at tað er farið at bora Snilehorn leitimiðið, og at umfevnandi leitivirksemi stendur fyri framman, verður nú eisini boðað frá, at framleiðslan á Njord og Hyme oljukeldunum í norskum øki, sum varð steðgað í juli, nú verður steðgað í eina tíð aftrat vegna skaða á sjálvan pallbygnaðin. Tað er Statoil, sum er fyristøðufelag og hevur tikið avgerð um at steðga framleiðsluni, til trupulleikarnir verða loystir. Statoil upplýsir, at framleiðslan á Njord og Hyme væntandi ikki byrjar aftur fyrr enn í øðrum ársfjórðing ella miðskeiðis í 2014. Framleiðslusteðgurin er longdur fyri at geva betri tíð til at fyrireika og fremja tær ábøtur, sum eru mettar at verða neyðugar, eftir at kanningarnar av strukturella tryggleikanum eru lidnar. Fleiri tíðindi hesum viðvíkjandi verða givin, eftir at Njord leiðslunevndin hevur havt fund í hesi viku, sigur Faroe Petroleum í tíðindaskrivi. Analysur, sum Statoil hevur gjørt, vísa, at pallurin hevur tikið skaða av, at ov nógv tyngd er á onkrum av palldekkunum. Framleiðslan varð steðgað 27. juli, tá alt gass og olja varð tikið av pallinum. Ætlanin tá varð at byrja aftur framleiðslu í september, men hetta er nú útsett í gott og væl eitt hálvt ár aftrat. Orsakað av framleiðslusteðginum á Njord eru mettu tølini fyri framleiðsluna hjá Faroe Petroleum fyri 2013 nú lækkað úr 7000-9000 niður í 5.500 til 6.500 tunnur um dagin. Faroe Petroleum eigur 7,5% í oljukeldunum, Njord og Hyme. Faroe Petroleum borar í løtuni Snilehorn leitimiðið í norskum øki og fer undir fleiri nýggjar leitibrunnar komandi mánaðirnar. Brunnarnir verða boraðir í øki, har framleiðsla longu finst og tí eru møguleikar at knýta møgulig nýggj fund í verandi framleiðslueindir.